# Nøvn

## Havnarbók í Miðlahúsinum




*Finnur Johansen signerar og selur bókina "Traðkaðu fólkinum slóð 2 - Havnin 1900-1940"*

Altjóða eldradagin fríggjadagin 1. oktober signerar og selur Finnur Johansen bókina "Traðkaðu fólkinum slóð 2 - Havnin 1900-1940" í Miðlahúsinum.

Bókin er framhald av fyrru bókini við sama heiti. Finnur skrivar í innganginum til fyrru bókina m.a. at í 1866 gjørdist Tórshavn sjálvstøðug kommuna, og í 1909 gjørdist býurin keypstaður, men um aldamótið 1900 var menningin av samfelagnum hundrað ár eftir grannatjóðirnar, eingir vegir, ongar havnir, eingin telefon, einki elektricitet og at kalla einki innanoyggja ferðasamband.

Í 1880-árunum og seinni vórðu nakrar útstykkingar gjørdar eystan fyri Tinghúsvegin og úti í Bø, í 1894 varð Kommunuskúlin bygdur og í 1896 Meinigheitshúsið, annars var einki bygt oman fyri Vaglið í 1900. Í 1898 fekk Havnin fyrsta vatnverkið, og í 1901 keypti kommunan innangarðsjørðina hjá Vestara Húsagarði, og fór undir at gera vegir og útstykkja økið av Vaglinum og niðaneftir. Havnin fekk sítt fyrsta elektricitetsverk í 1921, og í 1929 varð fyrsta byggistig av Tórshavnar Havn, Eystara Bryggja, liðugt, og menningin fór nú at ganga við rúkandi ferð.

Bókin er 200 blaðsíður við umleið 150 myndum av nógvum ymiskum áhugaverdum sum t.d. søgan um tey ymisku húsini í gomlu Havnini. "Traðkaðu fólkinum slóð 2" Havnin 1900-1940 er skrivað 100 ár eftir at Havnin gjørdist keypstaður.



### 25 ára starvsdagur

Fríggjadagin 1. oktober 2010 eru 25 ár liðin, síðani Bjarki Johannesen, Tórshavn, varð settur í starv sum verkfrøðingur í elfelagnum SEV.

---

†

**ANDLÁT**

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, mamma, vermóðir og omma okkara

**Malla Hansen**
Klaksvík

andaðist í heiminum mánadagin 27. september, 61 ára gomul.

Farið verður úr Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið 1. okt. kl. 18.00 heim í Betesda.

Jarðarferðin verður leygardagin 2. oktober klokkan 13.30 úr Betesda.

***Familjunnar vegna***

**Líggjas**

---

**TØKK**

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Martin E. Hansen**
Fuglafjørður

Fór heim til Harran.

***Familjunnar vegna***

**Andrea og børnini**

---

**TØKK**

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra systir, fastir og mostir okkara

**Lena Weihe**
Selatrað

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri heilsanir, blómur og gávur. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi, sum vóru góð við hana, tíðina hon var har.

***Familjunnar vegna***

**Ingrid og Bertha**

---

**TØKK**

Hjartans tøkk øll somul, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og rættu eina hjálpandi hond, tá ið kæra mamma, vermamma og omma okkara:

**Anna Kathrina Olsen, Klaksvík,**
(fødd Thomsen, ættað úr Norðragøtu)

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri orgulspæl, góð og troystarrík orð bæði á kapellinum og í kirkjuni.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Emmaus og tøkk til tykkum øll, ið komu at fylgja.

***Vegna familjuna***

**Jákup, Betta og Berghild**

---

†

**ANDLÁT**

Kunngjørt verður, at elskaði sonur og beiggi okkara

**Sæbjørn Petersen**

andaðist hósdagin 23. september, 19 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin kl. 18.00 í Skála kirkju.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju hósdagin kl. 14.

***fyri tey avvarðandi***

**Jonna, Jóan Petur**

**Elmar og Atli**